LM-099/2023

Fylgiskjal 66

ATLANTIC AIRWAYS

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 64

Atlantic Airways Faroe Islands P/F
Vagar Airport
FO-380 Sørvágur
Føroyar

Telefon +298 34 10 00
Telefax +298 34 10 01
Heimasíða www.atlantic.fo
E-mail jan@atlantic.fo

Your ref	Our ref / J no	Date
	18320-4931 / Jan Johannesen	*22. februar 2024*

Hoyringssvar frá Atlantic Airways í sambandi við uppskot um Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Atlantic Airways takkar fyri høvi at koma við viðmerkingum til uppskot um Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu, stytt "Ferðavinnulógin."

Vit fegnast um, at roynt verður at skipa ferðavinnuna í Føroyum. Tað er avbjóðandi at marknaðarføra Føroyar sum ferðavinnuland við verandi óskipaðu viðurskiftunum, har gjaldsportur og onnur átøk við stuttari freist broyta fortreytirnar fyri, hvussu ferðafólk skulu bera seg at í Føroyum, og hvørji figgjarlig krøv verða áløgd teimum.

Atlantic Airways hevur sum sítt fremsta mál at knýta Føroyar at umheiminum til frama fyri føroyingar og føroyska samfelagið, samstundis sum rutunetið eisini gevur útlendingum møguleika fyri at uppliva okkara ríku náttúru, mentan, matstovur og gistingarhús.

Ferðavinna og møguleikar hjá føroyingar at ferðast í onnur lond hanga óloysiliga saman. Sama er við ferðavinnu, og alt tað, sum vit sum ferðavinnuland, hava at bjóða. Við eini vaksandi ferðavinnu seinastu árini er talið av beinleiðis ferðamálum úr Føroyum økt munandi, og tað sama ger seg galdandi fyri talið av fráferðum, samstundis sum ferðaseðlakostnaðurin er lækkaður til fyrimuns fyri bæði frítíðarferðandi og ferðandi í vinnuligum ørindum. Ferðavinnan hevur eisini verið við til, at ment alskyns matstovu- og gistingarhústilboð og útferðarmøguleikar runt um í landinum. Harafturat fáa fleiri, ung sum eldri, í dag sína inntøku úr ferðavinnuni, og hetta hevur verið við til at gjørt Føroyar til eitt meira fjøltáttað land, umframt at hetta ber boð um, at ferðavinnan frameftir kann gerast eitt sterkt triðja bein hjá føroyska búskapinum at standa á.

Í uppskotinum um ferðavinnulóg verður mælt til at leggja eitt nátturugjald, ið landsstýrismaðurin ásetir, á øll ferðafólk, 16 ár og eldri, ið koma til Føroya. Í viðmerkingunum verða 150 krónur nevndar sum ein møgulig upphædd. Víðari verður skrivað, at gjaldið skal krevjast inn í sambandi við keyp av ferðaseðlum.

Vit mæla staðiliga frá, at eitt nátturugjald verður lagt á ferðaseðlakostnaðin. Eitt tílíkt gjald hevur við sær, at Føroyar sum ferðavinnuland verður minni kappingarført.

LM-099/2023

ATLANTIC AIRWAYS

Ferðaseðlar í flogvinnuni verða seldir av flogfeløgum, umframt ferðaskrivstovum, bæði føroyskum og útlendskum. Tá ið eitt ferðafólk keypir ferðaseðil til Føroyar verður ikki skrásett, hvør er "ferðafólk", ella hvørji eru føroyingar, ella føroyingur búsitandi uttanlands, og eingin skipan er tøk at innkrevja eitt gjald bert frá ávísum ferðafólkum. Til ber við tíðini hjá hvørjum flogfelagi sær at menna eina tílíka skipan, men hon hevði ikki rokkið út til søluliðini hjá ferðaskrivstovum í Føroyum ella uttanlands.

Í lógaruppskotinum stendur, at gjaldið verður kravt inn saman við ferðagjaldinum eftir løgtingslóg um ferðagjald. Til tað er at viðmerkja, at ferðagjaldið áljóðandi 65 krónur, ið verður kravt inn í sambandi við ferðing úr Føroyum, verður kravt inn frá øllum ferðandi, og ikki einans frá útlendskum ferðafólkum. Einki í verandi ferðaseðlaskipan gevur møguleika fyri einans at krevja ferðagjald frá ávísum ferðafólkum.

Lógin hevur heldur ikki eina allýsing av, hvør er ferðafólk, og hvør tí skal gjalda náttúrugjaldið, og hvør ikki skal gjalda.

Okkara tilmæli er at leggja eitt gjald á allar gistingar í Føroyum, íroknað Airbnb, summarhús og líknandi gistingar, umframt ferðafólk við cruise-skipum, ið ikki eru við í skrásetingini av gistingum, ið Hagstova Føroya stendur fyri. Eitt tílíkt gjald hevði eisini verið við til lutfalsliga at kravt meira frá teimum, sum steðga longri tíð í Føroyum.

Í kapittul tvey verður nevnt, at í 2022 vitjaðu 110.000 ferðafólk í Føroyum og í 2026 verður talið mett at verða 140.000-145.000 ferðafólk. Eftir okkara tykki er talið í lægra lagi, tá ið ferðafólk við ferðafólka/cruise-skipum verða tald við.

Í aðar mátar taka vit undir við kravinum um staðbundnar ferðavinnuætlanir.

Fyri okkum, sum dagliga virka í ferðavinnuni, hevur tað avgerandi týdning, at slíkar broytingar ikki verða settar í gildi frá degi til dags, men at vit fáa tíð til at laga okkum til broytingarnar. Vísast skal eisini á, at flogfeløg selja ferðaseðlar 360 dagar fram í tíðina, og skuldi tað – ímóti okkara tilmæli – endað við, at gjaldið skal takast inn saman við ferðagjaldinum, má hædd onkursvegna eisini takast fyri teimum ferðaseðlunum, ið longu eru seldir.

Vit vóna, at ein loysn verður funnin á málinum um gongd í haga og skipan av ferðavinnu í Føroyum.

Vinarliga
Atlantic Airways P/f

Jóhanna á Bergi
Forstjóri